LØGTINGIÐ

Kári á Rógvi, løgtingsmaður
Gundadalsvegur 22
FO-110  Tórshavn

Landsstýrismálanevndin

**7. april 2008**
**j. nr.  7.13-20080007² ks/ás**
(at tilskila í svari)

*Soljóðandi skriv er í dag sent Hans Paula Strøm og Karsten Hansen, landsstýrismonnum:*

**"Viðvíkjandi sølu av sjúkrahúsbygningum (íbúðabygningum, løgujáttan)**

Við skrivi, dagfest 27. mars 2008, hevur landsstýrismálanevndin fingið áheitan frá Kára á Rógvi, tingmanni, um, at nevndin tekur "viðgerð landsstýrismansins í almannamálum av málinum um sølu av sjúkrahúsbygningum (íbúðabygningum, løgujáttan)" til viðgerðar.

Málið varð umrøtt á fundi í landsstýrismálanevndini tann 4. apríl 2008.

Á fundinum gjørdi nevndin av at senda skrivið til ummælis hjá landsstýrismonnunum í avikavist almanna- og heilsumálum og fíggjarmálum og harumframt at biðja um innlit í skjølini í málinum sum heild.

Svarfreistin er sett til 21. apríl 2008.

Avrit av hesum skrivi er sent Kára á Rógvi, tingmanni, til kunningar."

*Sagt verður frá hesum.*

N.v.

Heidi Petersen
formaður